## HOYVÍK
Raðhús, Torkilsgøta 8




184 248 2 2002

Góð raðhús í 2 hæddum. Í niðaru hæddini er inngongd, vaskirúm, vesi við brúsu, køkur/stova, eitt kamar. Frá køkini er útgongd til terassuøki við skervi. Í ovaru hæddini er gongd, stórt baðirúm við gosbaði, 2 lítil klædnarúm, 3 kømur. Sera barnavinarligt umhvørvi.

Prísuppskot: 2.200.000

## HOYVÍK
Íbúð, Maritugøta 55 h




76 76 1 2006

Góð og vælhildin íbúð við gongd, baðirúmi, køki/stovu, 2 kømrum. Gott ovastaloft á 18 m² og skúrur á 4 m². Gólvini eru bókparkett. Dagstovnur og býlingshús eru beint við. Stutt til skúlar og ítróttahøll.

Prísuppskot: 1.650.000

## TÓRSHAVN
Sethús, Gundadalsvegur 29




196 395 2 1965

Vælhildin sethús í 2 hæddum. Ovara hædd: hjallur, inngongd/durur, gongd, baðirúm, grovkøkur, køkur/stova, 2 kømur. Niðara hædd: gongd, baðirúm, kjallararúm/vaskirúm, 2 stór kømur. Sera vakur urtagarður og lagaður grótgarður.

Prísuppskot: 2.700.000

## TÓRSHAVN
Íbúð, Vesturgøta 22-101



42 42 1

Íbúðin hevur gongd, baðirúm, køk/stovu og eitt kamar. Frá køkinum/stovuni er útgongd til terassu. Gott goymslurúm. Felags antenna og vælvirkandi eigarafelag. Stutt til Handilsskúlan, Tekniska skúla, barnagarð og handil.

Prísuppskot: 1.150.000

## VELBASTAÐUR
Grundøki, á Jákupstrøð



576

Gott grundøki ovarlaga á Velbastað, matr.nr. 24g. Grundøkið liggur væl fyri í barnavinarligum, friðarligum og náttúruvøkrum umhvørvi við góðum útsýni yvir Sandoynna og Heystoynna. Bert 200 m eru til dagstovn.

Prísuppskot: 450.000

## SØRVÁGUR
Grundøki, Bakkavegur



111

Til sølu eru matr.nr. 55, 398 og 291b. Við tað at tey liggja saman, eru tey væl egnað sum ein stór neystagrund á 111 m².

Prísuppskot: 250.000

## HVALVÍK
Tvíhús, við Gráastein 6



200 280 3 2008

Tvíhús í 3 hæddum. Miðhædd: gongd, baðirúm, køkur, stova, 2 kømur. Loft: gongd, baðirúm, stór loftsstova, kamar. Eisini verða tvær klædnagoymslur. Kjallarin verður óinnrættaður. Liðug á sumri í 2008.

Prísuppskot: 1.500.000

## TÓRSHAVN
Sethús, Pedda við Steing. 12



184 416 2 1949

Sethús í 2 hæddum. Ovara hædd: gongd, baðirúm, køkur, stova, 3 kømur. Kjallari: kjallararúm, køkur/uppihaldsrúm, baðirúm og 4 kømur. Garður er runt um húsini. Veðurgott umhvørvi nærindis miðbýnum.

Prísuppskot: 1.900.000

## TÓRSHAVN
Tvíhús, á Heygnum Mikla



184 300 3 2009

Lyklaklár hús í 3 hæddum. Miðhædd: gongd, baðirúm, køkur, stova við altan. Loft: trý kømur og eitt stórt baðirúm. Kjallarin er óinnrættaður, tó er niðurgongdin frá miðhæddini gjørd. Av 6 húsum eru 4 hús seld.

Prísuppskot: 2.275.000

## LAMBI
Sethús, Lambavegur 17



206 842 2 1945

Sethús í 2 hæddum. Ovara hædd: gongd, baðirúm, køkur, spísistova, tvær stovur og tvey kømur. Niðara hædd: eitt stórt og gott rúm, eitt kamar og fleiri kjallararúm. Yvirtøkan av húsunum kann verða skjótt.

Prísuppskot: 800.000

skyn
eingin tilvild

Tórsgøta 16 · Tel 35 74 00 · Fax 35 74 01 · www.skyn.fo

SENDISTOVAN

www.skyn.fo

Skyn er partur av Føroya Banka











# Góð og hugnalig íbúð í Hoyvík

Í íbúðini, sum liggur á aðru hædd, er gongd, baðirúm, vaskirúm, køkur og stova í einum og tvey kømur. Í gongini eru flísar á gólvinum. Frá stovuni er útgongd til eina góða altan við góðum sólargangi seinnapartin. Eisini er eitt gott ovastaloft á 18 m2 við áløgdum gólvi og eitt goymslurúm á 4 m2. Íbúðin er nútímans, ljós og sera hugnalig. Køkurin er ljósur av merkinum Modulia frá Balslev og er sera snøggur og arbeiðsvinarligur. Gólvini eru bók parket. Internetstik er í øllum rúmunum. Íbúðin kann yvirtakast beinanvegin. Parkeringsumstøðurnar eru góðar.

Íbúðin liggur í góðum og barnavinarligum umhvørvi við góðum grannalagi, spæliplássi og FIFA-vølli beint við. Dagstovnur og býlingshús er beint yvirav íbúðini. Stutt er til nýggja skúlan við Løgmannabreyt og eisini til Hoyvíkar skúla, kirkjuna og ítróttarhøllina.

Íbúðin er væl egnað til tey, sum ynskja at flyta úr teirra stóra húsi til eitt minni stað við minni viðlíkahaldi – og harafturímóti at fáa meira tíð til sín sjálvs og síni frítíðarítriv. Eisini er íbúðin vælegnað til familjur uttan børn og til familjur, sum hava vaksin børn.

**Fakta:**

Adressa: ..........Maritugøta 55 h, Hoyvík
Stødd innan: ....76 m²
Grundøkið:.......76 m²
Hæddir:............1
Byggiár:............2006
Prísuppskot: ....kr. 1.650.000,-

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**